# Ein sterkan kaffimunn

**Fólk í Kollafirði hava higartil ikki havt møguleika at keypa sær ein góðan kaffimunn í bygdini ella fara út at eta. Nú fer Cafe Chill' at bøta um hetta.**

MATSTOVA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Alment er cafe'in ikki latin alment upp, men hevur kortini tikið ímóti fólki í hesi vikuni. Ikki fyrrenn seinnapartin leygardagin verður tann almenna upplatingin.

Tað eru tær báðar Jónvør Svartá og Guðrið Joensen sum hava tikið stig til Cafe Chill', og sum í eina tíð hava fyrireikað upplatingina í hølunum beint við skúlan og ítróttarhøllina í Kollafirði.

Ætlanin er at hava eitt breitt úrval av matvørum og drykkivørum, og at hava dagsins rætt á skránni á middegi hvønn dag.

Umframt mat og drekka er ætlanin somuleiðis at útvega sær stórskíggja og at hava fyrilestrar og livandi tónleik inni í cafe'ini.

- Vit meta at tørvur er á einum slíkum staði. Her er skúli, ítróttarhøll og omanfyri 1000 fólk í bygdini. Jú, vit eru sera spentar, siga tær báðar Jónvør og Guðrið.



*Nógv er gjørt burtur úr innrættingini í cafe'ini hjá Guðrið Joensen (vinstrumegin) og Jónvør Svartá*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




Veðrið í morgin:
Skrið ella stormur av vestri, seinnapartin nakað minni vindur. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 0 og +3 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin hvassur vindur ella skrið av útsynningi og regn, út á seinnapartin upp í hvassan storm av vestri og ælingur, partvís kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av suðri og regn. Týsdagin hækkar hann upp í vestan og ælingur. Hitin millum 2 og 6 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -18 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | -2 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 9 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 6 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. vestan fyri Hebridurnar fer í landnyrðing og dýpist. Eitt annað lágtrýst, 962 hPa. við Hvarvið fer móti Íslandi.



**Í dag:**
Lágtrýstið við Jan Mayen fer spakuliga eystureftir. Lágtrýstið á 50N~40V fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/2 kl. 06[00] – 15/2 06[00]. Hitin í gjár: 6,2°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í februar: 11°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 12/2 kl. 06[00] – 13/2 06[00].
Avfallið higartil í februar: 38 mm

**Tiltøk í Miðlahúsinum**

*21. februar*
*Yggdrasil/Jazzfelagið*

*22. februar*
*Yggdrasil/Jazzfelagið*

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

14. feb. Mánin næstur jørðini
21. feb. Fullmáni
28. feb. Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. feb. | 06.45 | 19.07 | 05.45 | 18.07 | 06.00 | 18.22 | 08.45 | 21.07 | 09.45 | 22.07 | 05.00 | 17.22 | 04.00 | 16.22 | 07.00 | 19.22 | 08.00 | 20.22 | 06.30 | 18.52 | 07.45 | 20.07 |
| 22. feb. | 07.30 | 19.51 | 06.30 | 18.51 | 06.45 | 19.06 | 09.30 | 21.51 | 10.30 | 22.51 | 05.45 | 18.06 | 04.45 | 17.06 | 07.45 | 20.06 | 08.45 | 21.06 | 07.15 | 19.36 | 08.30 | 20.51 |
| 23. feb. | 08.13 | 20.32 | 07.13 | 19.32 | 07.28 | 19.47 | 10.13 | 22.32 | 11.13 | 23.32 | 06.28 | 18.47 | 05.28 | 17.47 | 08.28 | 20.47 | 09.28 | 21.47 | 07.58 | 20.17 | 09.13 | 21.32 |
| 24. feb. | 08.52 | 21.12 | 07.52 | 20.12 | 08.07 | 20.27 | 10.52 | 23.12 | 11.52 | - | 07.07 | 19.27 | 06.07 | 18.27 | 09.07 | 21.27 | 10.07 | 22.27 | 08.37 | 20.57 | 09.52 | 22.12 |
| 25. feb. | 09.33 | 21.53 | 08.33 | 20.53 | 08.48 | 21.08 | 11.33 | 23.53 | 00.12 | 12.33 | 07.48 | 20.08 | 06.48 | 19.08 | 09.48 | 22.08 | 10.48 | 23.08 | 09.18 | 21.38 | 10.33 | 22.53 |